# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Aftur í 20'ini




*Her eru seks modellir ílætnar mótaklæðir og hárstíl frá 1920-unum. Bilin, ein Ford A, eigur Hans Korsgaard í Havn*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Á Stíl- & Sniðdeildini á Tekniska Skúla í Havn eru SIT-næmingar lidnir við eina verkætlan við inspiratión frá mótanum í 1920-unum.

Mikudagin høvdu tær eina framløgu, har tær presenteraðu verkætlanina. Í hesum sambandi høvdu tær fingið ein bil, sum umboðar tíðarskeiðið í 1920-unum. Talan var um ein Ford A, sum vórðu framleiddir í USA í tíðarskeiðnum 1927-1931.

SIT stendur fyri "Støðisútbúgving Innan Tøkni" og er ein handalig og bóklig fyrireikandi grundútbúgving innan ymisk fak á Tekniska Skúlanum sum t.d. timbur, el, metal, bil og stíl- og snið. S.I.T-útbúgvingin gevur góðar møguleikar til víðari lestur.

Talan er um tríggjar ymiskar breytir á Stíl- & Sniðdeildini: SIT-Hár, SIT-Klædnaatstøðingar og SIT-Kosmetikarar. Tær, sum gjørdu hesa verkætlanina, tóku útbúgvingina SIT-Hár. Tær byrjaðu í august 2008 og verða endaliga lidnar í juni 2009. Tá hava tær eina SIT-útbúgving og útbúging sum stylistar og make-up artistar.

*mg*

## Andlát og jarðarferðir

**Maria Hansen, Klaksvík**, andaðist á Sambýlinum á Heynum, 89 ára gomul. Kistan fer av Sambýlinum á Heygnum hóskvøldið kl. 18. Jarðarferðin verður úr Betesta fríggjadagin kl. 13.30. Tey, ið vilja minnast Mariu, kunnu lata eina peningagávu til Zarepta, konta í peningastovninum.

**Jana Olivia Jacobsen**, ættað úr Fuglafirði, búsitandi í Havn, andaðist mánadagin, 91 ára gomul. Farið verður úr Landssjúkrahúskapellinum hósdagin kl. 17. Jarðarferðin verður úr Kirkjugarðskapellinum fríggjadagin kl. 13.

**Aron Strømsten, Sandavági**, andaðist sunnudagin á Ríkissjúkrahúsinum, 76 ára gamal. Jarðarferðin verður hósdagin kl. 14 úr Sandavágs kirkju. Sungið verður úr sálmabókini. Tey, ið vilja minnast Aron, kunu lata eina peningagávu á konto í Føroya Banka.

## 35 ára føðingardagur



Tann 3. mai verður Solina Jacobsen 35 ár. Dagurin verður hildin 2. mai kl. 19.00 í Samljóð í Skopun við einum drekkamunni.

## 85 ára føðingardagur

1. mai verður Mortan Mortensen, Hvalba, 85 ár. Dagurin verður hildin saman við børnunum.

## Jeremias

»Jeremias – hin grátandi profeturin« er heitið á nýggjari bók eftir Zacharias Zachariassen í Gøtu, sum Forlagið Leirkerið hevur givið út.

Zacharias sigur í formælinum í bókini at frá ungum árum hevur ein av yndisbókum hansara í Gamla Testmenti verið bók Jeremiasar. Boðskapur Jeremiasar er sera grípandi, týdningarmikil og viðkomandi, tí at tíðin, tá ið Jeremias livdi, var á mangan hátt so meinlík okkara tíð. Bókin, ið eg havi skrivað, er ein roynd at hjálpa ungum sum eldri betur at skilja Jeremias og fáa størri andaligt innlit í hesa áhugaverdu bók. Tilfarið havi eg so við og við savnað saman og skrivað gjøgnum árini.

Zacharias er føddur í Gøtu í 1935 og hevur virkað sum trúboðari í 50 ár. Umframt at tala orð Guds víða hvar í Føroyum, hevur hann verið virkin á tíbókliga økinum. Hann hevur skrivað, týtt, yrkt, samskipað og givið út kristiligan lesnað. Hann hevur verið blaðstjóri í 40 ár, fyrst – saman við øðrum – á tíðarritinum Røddini, og seinastu 25 árini á Leirkerinum.

Bókin er 304 blaðsíður og fæst við bleytari permu eins og innbundin. Umframt gjøgnum bókaringin hjá Forlagnum Lerikerinum, tlf. 441093, fæst bókin eisini til keyps í bókabúðunum kring landið.



*Zacharias Zachariassen*




*mg*

**Dagurin**
**30. apríl. Severus.** Var í fimtu øld biskupur í Napoli.
*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*

